Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjarni Kárason Petersen, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Inntøkur og útreiðslur hjá Vága- og Norðoyatunlunum

Spurningar:

1. Hvørjar hava árligu inntøkurnar verið hjá ávikavist Vága- og Norðoyatunlinum síðan 2016?
2. Hvørjar hava árligu útreiðslurnar verið hjá ávikavist Vága- og Norðoyatunlinum síðan 2016, skift á rakstur, viðlíkahald, umsiting og umvælingar?
3. Hvussu nógv hevði tað kostað landskassanum at strikað tunnilsgjøldini í ávikavist Vága- og Norðoyatunlinum?
4. Er nøkur avtala gjørd um, at tunnilsgjøldini á Vága- og Norðoyatunlunum skulu strikast, eftir at teir eru útgoldnir?
5. Arbeiðir landsstýrismaðurin við einum nýggjum fíggingarleisti fyri samferðslukervið?

Viðmerkingar:
Nógv orðaskifti hevur verið um tunnilsgjøldini fyri undirsjóvartunlarnar í Føroyum. Útbyggingin av samferðslukervinum hevur í ein stóran mun verið fíggjað av brúkaragjøldum.

Hesi brúkaragjøldini hava fyrst og fremst verið brúkt til at fíggja Vága- og Norðoyatunlarnar, og hava havt við sær, at teir eru væl hildnir og í sera góðum standi.

Tað hevði verið áhugavert at vitað, hvat tað merkir fyri ávikavist Vága- og Norðoyatunnilin, um mann strikar tunnilsgjøldini.

Tað hevur verið frammi, at ein avtala er, sum sigur, at tunnilsgjøldini fyri Vága- og Norðoyatunlarnar skulu strikast, eftir at teir eru útgoldnir. Tað er týdningarmikið at fáa at vita, um tað veruliga er so.

Framtíðar útbyggingar av samferðslukervinum – eitt nú undirsjóvartunnil til Suðuroynna – fara at bera við sær týðandi útreiðslur fyri landið. Tí hevði verið áhugavert at vitað, um landsstýrismaðurin arbeiðir við einum nýggjum fíggingarleisti fyri samferðslukervið.

Á Løgtingi, 15. september 2022

Bjarni Kárason Petersen